## DAGSINS MEINING

# Samfelagsbroytingar og vónir

Hóast olja ikki er funnin – tað vit vita í skrivandi løtu – hevur politiska orðaskiftið tó snúð seg um oljuinntøkurnar. Løgmaður, sum annars plagar at vera hóvligur, hevur tosað nógv um oljutjekkar ol. Men samtíðis hevur hann eisini mælt til varsemi. Og sjálvandi er tað varsemi, ið má eyðkenna hetta. Tað má ikki blíva sum í Falklandsoyggjunum. Tá fyrstu boringarnar vístu tekin til olju varð tosað um allar millióningarnar, men tað skuldi vísa seg, at har var ikki nokk av olju at tað lønaði seg.

Nú boringarnar á landgrunninum nærkast avgerandi vegamóti er stórur spenningur. Seinasta politiska útmeldingin í hesum sambandi kom frá varaløgmanni undir vitjan í Álandi. -Verður olja funnin við Føroyar nú kann hon gerast avgerandi fyri sjalvstýristilgongdina. Nakað soleiðis segði varaløgmaður við álendska útvarpið. Hann kendi seg tí eisini sannførdan um, at Føroyar fáa fullveldi um nøkur ár.

Tað er eitt sindur løgið, at framstandandi landsstýrismenn nú brádliga, meðan borað verður og landsstýrið sjálvt hevur gjørt av, at einki skal koma út um boringarnar, kortini taka oljuna fram sum tað, sum meira ella minni skal bjarga sjálvstýristilgongdini. Sami landsstýrismaður hevur annars áður sagt, at tað er ikki rætt at kalkura við oljuni í sambandi við fullveldið, tí vit vita jú ikki, um hon er har. So tá varaløgmaður nú tykist skifta hest og sigur oljuna vera avgerandi fyri sjálvstýristilgongdina, eru tað nýggir tónar ella tað kann tulkast sum, at varaløgmaður kanska veit meira enn vit onnur ella at hann hevur tikið munnin ov fullan.

Er varaløgmaður endurgivin rætt, merkir tað væl, at hansara niðurstøða eisini má vera, at verður einki funnið í undirgrundini, so er tað ein dyggur smeitur fyri sjálvstýristilgongdina. So vil tað seinka ætlaðu sjálvstýristilgongdina ella – so verður grundarlagið tikið undan henni! Spurningurin er tí, um ikki nettupp vónirnar til oljuinntøkur eru ella hava verið drívandi megin hjá fullveldisarkitektunum. Hetta hava varaløgmaður og hansara fólk tó ongantíð viljað viðgingið. Um so er má sigast, at fullveldisætlanin, ið jú snýr seg um at kolvelta føroyska samfelagið, byggir ikki á trygga grund, tá hon byggir á vónir heldur enn á realitetir. Eitt er at byggja upp egnan førleika til komandi avbjóðing, hóast vit ikki vita, um olja finst, nakað annað er at byggja eina kolveltandi samfelagsbroyting á nakað, tú ikki veit er til. Stóri blokkniðurskurðurin byggir væl ikki eisini á – eitt nú psykologiskt – vónir til nakað vit ikki enn vita er til?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin vil hækka pensiónir

**Sune Jacobsen**



Ein blaðgrein frá Atla Hansen hevur gjørt Sámal Petur í Grund firtnan. Hann revsar navngivnar sambandsmenn og eisini undirritaða, tí vit ikki hava róst Sjálvstýrisflokkinum fyri tað, hann hevur gjørt á almanna- og heilsuøkinum í hesum valskeiðnum.

Eg skal bara svara fyri meg sjálvan, hinir klára at svara fyri seg. Sambandsflokkurin hevur, eftir ólavsøku, m.a. lagt uppskot fyri tingið um at hækka pensjónirnar og at avtaka serliga avgjaldið á brenniolju. Undir viðgerðini av hesum málum segði eg, at samgongan hevði ótrúliga lítlan áhuga fyri pensjónistunum. Eg vísti á, at í tí afturlítandi partinum av løgmansrøðuni var økið bert nevnt við fýra orðum, nevniliga hesum: » Pensjónirnar eru munandi hækkaðar.«

Eg kann ikki rósa Sjálvstýrisflokkinum fyri hesa hækking, og eg kann heldur ikki vera samdur í, at hetta er ein munandi hækking, tí enntá sambært Helenu Dam á Neystabø er henda hækking alt ov lág. Hon sigur so tíðliga sum 5. oktober 2000: »Okkara fólkapensjónistar - og serliga teir, sum bara hava fólkapensjónina at liva av- hava hvørki góð ella tolulig inntøkuviðurskifti enn. Hóast hesi hava fingið 800 til 1000 krónur meira at liva fyri um mánaðan í ár, so skylda vit teimum eina veruliga dagføring av fólkapensjónini.«

Og sjálvt um HDáN segði hetta fyri næstan einum ári síðani, so er einki komið frá SPíG enn, og sambært hansara samgongufólki í tinginum, er einki ítøkiligt á veg heldur. Bert tos og aftur tos og gamla svadan um, at landsstýrið arbeiðir við málinum.

Nei, tað er als ikki her skógvurin trykkir hjá SPíG. Hann hevur ilt av, at hann av misgáum undir orðaskiftinum kom at siga, at hann ikki vildi selja frælsið hjá føroysku tjóðini fyri eina upphædd, óansæð um hon var 450kr. ella 1000 kr. Og her er munurin á Sjálvstýrisflokkinum og Sambandsflokkinum. SPíG er floytandi líkaglaður, um pensjónistarnir liva á ella undir hungursmarkinum, bara hann fær fullveldið.

Sambandsflokkurin setir ikki fullveldið í hásætið, men vil fyrst og fremst, sum liberalur flokkur, virka fyri andaligum og fíggjarligum frælsi fyri hin einstaka. Og vit tora at siga, at fullveldið fer at kosta vælferð. Og júst hetta uppskotið hjá Sambandsflokkinum prógvar tað, eg áður havi sagt, um tað skuldi hent, at tað verður felt.

Í uppskotinum verður mælt til, at 400 mió. kr. av yvirskoti landskassans verða settir í grunn beinanvegin. Í staðin fyri at lækka blokkin við 400 mió. kr. komandi ár, lati okkum so heldur seta 400 mió. kr. í grunn aftrat, soleiðis, at stovnsfæið verður 800 mió. kr. Avkastið ella rentan vil so geva hvørjum einstøkum pensjónisti ein 1000 kr. seðil um mánaðan í alla ævir.

Uppskotið hjá Sambandsflokkinum er veruliga fuglurin í hondini. Hendan samgongan hevur nevniliga tikið 600 mió. kr ov nógv inn í skatti hvørt ár, hon hevur sitið. Og hvat fer samgongan at gera við henda pening ? Fara tey at gjalda hann út aftur til skattgjaldaran?- Nei. Fara tey at koyra hann í grunn, so allir okkara pensjónista kunnu fáa ágóðan av avkastinum?- Nei, sambært SPíG. Vit selja ikki frælsið, men koyra peningin lúkst í búskapargrunnin, sum skal fíggja fullveldið. Hetta eru ikki bara hugsanin hjá SPìG, men hjá allari samgonguni.

Hvat fanglast so Sámal Petur í Grund við í hesum døgum. Jú, hann liggur skerflatur í luftini og tosar við Nyrup um at yvirtaka almenna forsorg við ársbyrjan 2002. Hendan forsorg kostar í dag árliga 100 mió. kr., sum danir gjalda. Eftir 1. januar skulu vit sjálvi gjalda, og at tað ikki fer at ganga út yvir onkran, tað ivast vit ikki í.

Viðvíkjandi oljuavgjaldinum er at siga, at meðalnýtslan hjá hvørjum húski er 4000 litrar. Søluprísurin á olju er nógv hækkaður, og landskassin fær munandi meira inn í meirvirðisgjaldi av somu orsøk. Sambandsflokkurin vil avtaka oljugjaldið, sum samgongan hevur sett til 0.80 kr. pr. litur. Hetta vil lætta um nýtsluna hjá hvørjum húski við 3.200 kr. árliga.

Harra Sámal Petur í Grund, Sambandsflokkurin hevur sagt og sigur, at vøksturin í búskapinum skal koma tí einstaka til góðar. Nú er tann lagaliga løtan, og vit kunnu lætta eitt sindur um hjá teimum, sum hava stríðst og strevast fyri at hava fingið landið á føtur aftur.

Verður uppskotið um pensjónirnar samtykt, vil hetta geva pensjónistahjúnum 24000 kr. meira árliga, og verður uppskotið um avgjaldið á brenniolju sett úr gildi, vil hetta geva 3200 kr. eyka ella tilsamans kr. 27.200 kr. meira at liva fyri árliga.

Tað er møguligt, at hesi uppskot í SPíG`sa verð eru neyðaregg, men vit í Sambandsflokkinum eru sannførd um, at hetta eru kolumbusaregg.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Anakronistisk útiseta-kommunisma frá 60-árunum á veg til at fuppa sær valdið í Føroyum við klonaðum lesarabrøvum?

**Regin Eikhólm**



Í Sosialinum 10. august verður kunngjørt eitt teldubræv frá Kjartani Hoydal, har hann bjóðar seg fram, at gera uppskot til lesarabrøv sum stuðla undir loysingarmálið. Hesi præfabrikeraðu lesarabrøv skulu samstundis mótmæla at løgmaður »roynir at billa fólki inn, at vit enn eiga at samráðast við donsku stjórnuna«. Teldubrævið sigst einans vera ætlað limum í loyniligu loysingar losjuni, Hesuferð, men var kortini sent fleiri øðrum harímillum sjálvum løgmanni.

Eru limirnir í Hesuferð veruliga so illa fyri, at teir ikki hava førleika til sjálvir at skriva, men mugu hjálpast við præfabrikeraðum lesarabrøvum beinleiðis frá chefideologinum í London? Hvussu stendur tá til við teirra sjálvsmensku? Teir valla evna ella koma sær at broyta so mikið sum eitt komma í tí, sum kemur frá sjálvum chefideologinum.

### Antidonsk málpurisma

Kann tað hugsast at okkara málpuristar hava eina ábyrgd her? Við teirra ofta einvegis politiserandi antidonsku fremmandagerðing av vanligum føroyskum hava teir tikið dirvið frá mongum føroyingi til at skriva á sínum egna móðurmáli, og harífrá og til at føla seg sum funktionellan analfabet er ikki langt - enntá í sjálvum móðurmálinum. Óiva er tað hetta fyribrygdið, sum chefideologurin í Hesuferð nú roynir at kompensera fyri? Tó so, kendi danski poeturin, Piet Hein sigur, at: »Den som låner vid og sjæl fra anden, forskriver sig til Fanden; thi den som ikke er sig selv, er heller ingen anden«. Men »vit eru føroyingar serstøk tjóð«, so kanska tað er loyvt onkrum at lána tað sum írestar til fullblóð?

### Skipaður ágangur

Løgmaður skýrir uppskotið til hesi præfabrikeraðu lesarabrøv fyri »skipaðan ágang«, og tað hevur hann góðar grundir til. Men sum tann demokratur løgmaður er, hevur hann - tilvitað ella ikki - givið ov nógv eftir fyri tí totalitert íblásta varaløgmanni, soleiðis at landspolitiska ræðisrúmið í stóran mun nú verður umsitið av varamanninum. Men sjálvt um røddin har er Jákups, so munnu hendurnar í so mongum føri vera Esavs?

### Machiavellisman

Tað sum vit her eru vitnir til, er gamal íblástur frá Machiavellismuni (Niccolò Machiavelli Itl., 1469-1527 ), har einhvør politisk handling er moralsk, so leingi hon tænir einum ávísum endamáli. Út frá hesum hevur Kjartan Hoydal so æviga rætt, tá hann undrast á ávaringina frá løgmanni. Harragud, tað sum her hendir, er ikki annað enn tað sum kommunisman, nazisman, fascisman og islamiska fundamentalisman hava brúkt við eitthvørt høvi — it runs in the family!

Kjartan Hoydal et al. gloyma, at í Føroyum byggir okkara politiski samleiki á demokratiskan ella fólkaræðisligan grundvøll og ikki á anakronistiska útiseta-speidarakommunismu frá 60-árunum. Har tað totalitera byggir á vold og makt, byggir fólkaræði á opinleika og samráðingar.

### Tað hvørvandi lívsfrælsi

Lívsfrælsi fyri vanliga føroyingin, sum Petur Mohr Dam, sáli tosaði um, er altíð við atliti til fíggjarligt frælsið. At varaløgmaður einvegis letur blokkin minka við 350 millónir krónum komandi ár, uttan nakra samráðing yvirhøvir, vísir ein ábyrgdarleysan einaræðis hugsunarhátt, tí tað kemur at skerja persónliga frælsi føringa munandi.

Fyri bert at nevna eitt akut øki, so hevði upphæddin til dømis verið meir enn nógmikið til at tryggja øllum teimum undirprioriteraðu røktarkrevjandi í Føroyum ansingarpláss undir manssømuligum korum. Ikki minst fyri tey avvarandi hevði hetta verið ein ómetaligur lætti, tí tey høvdu sjálvi fingið nakað av sínum lívsfrælsi aftur.

Gamla kabaretvísuni verður tíverri aktuell aftur: »Einki stríð av teim gomlu og sjúku, oh nei, trælanípan er meira bekvem. Tey vit gippa útav, søkkja tey undir kav, har er onki hjá gomlum at fá«. Jú forrestin, orð, kanningar og lyftir hevur tað ikki trotið uppá í hesi loysingarsamgongu. Nógv hevur verið skrukkað, men onki er vorpið.

### Ókvæmsorð ella frændavitjan

Høgni Hoydal hevur moralskt mist sítt politiska mandat, sum hann fekk við seinasta løgtingsval, grundað populistisku ákæruna ímóti dønum, sum kortini vísti seg at vera følsk smb. frágreiðingina um 80-árini, sum Føroya Løgting gav út í 2000.

Við íblástri frá Machiavellismuni, har samráðingar eru eitt fremmandaorð, halda feðgarnir tó ideologiskt fram við teirra danafobu fanatismu, og gera yvirtøkumál til sjálvtøkumál, tað verið seg politið ella kirkjan, við ella uttan lóg!

Ætlanin er sjálvsagt, at hesin totaliteri ómoralur skal gjøgnumsúrga sum mest í okkara lítla samfelag. Sjálvt á okkara almennu stovnum, hvørs vælútbúnu starvsfólk næstan uttan undantak hava fingið teirra útbúgvingarførleika í Danmark kvit og frit, ditta fleiri teirra sær at umtala samráðingarnar við danir við niðrandi ókvæmsorðum, meðan íslendsk sendinevnd um somu tíð eitur »frændavitjan«.

### Demokrati ella anakronistiskt útiseta kommunisma

Ynskja føroyingar eitt anakronistiskt kommunistafrælsi við fáum ríkum og mongum fátækum eiga vit at stuðla Hoydalsfeðgunum og undirskriva so mong klonaði loysingarlesarabrøv sum gjørligt. Ynskja vit hinvegin, tað sum Petur Mohr Dam nevndi lívsfrælsi, so stuðla vit demokratisku menningini av Føroyum við at vísa Machiavellismuni og hennara einaræðis íblástu avleykarum durafjórðingin, og seta eina samráðingarnevnd niður sum í minsta lagi umboðar ein kvalifiseraðan meiriluta av Føroya fólki. Tá er tað Føroya fólk og demokratiið sum talar og avgerð, eins og Nyrup hevur víst á alla tíðina, og løgmaður eisini vísti á at byrja við.

Feðgarnir hjá Heðin Brú sluppu við at lata kúnna, Hoydalsfeðgarnir harafturímóti eru við at avreiða lívsfrælsi føroyinga — take care!

# Skemdarorð ella lýsingarorð Invektiv ella adjektiv

**Rolf Guttesen**



A. Guttormur Djurhuus følir seg kallaðan til at verja formannin í Tjóðveldisflokkinum, varaløgmann, Høgna Hoydal, sum mann vera tann næst-týdningarmesti í meylgøluni, aftaná sjálvan sendaran, (Sosialurin 21.8.01). Eg noyddist, í hesum álvarsliga máli, at brúka nøkur heitir, lýsandi orð, fyri at staðfesta hvar í politiska universinum HH, eftir mínum tykki, varð staddur.

Men sjálvandi kann eg hava mistikið meg. Lesarabrævið hjá Guttormi fær meg tó at halda, at eg man hava verið á beinari leið. Guttormur kemur ikki við nøkrum nýggjum í sakini, men leggur leggur meg undir at vera hvat sum helst.

Eg skal ikki taka alt upp aftur, men eg meini framvegis, at ein maður sum letur seg stýra av bakmonnum, ikki er stýrimaður, men sprellimaður. Ein maður, sum ikki heldur orð, er orðloysingur. Ein maður, sum bert dugir at siga eitt orð: fullveldi, og sum bert ber víðari tað, sum aðrir leggja honum í munnin, er ein gorrari. Fær ein persónur við hesum eginleikum »evsta vald«, ja, so er illa statt.

Eg kundi spurt Guttorm: Hvar fór bólturin. Royndi tú at sparka bóltin, so var tað eitt stórt kiks. Tú sigur ikki eitt orð um spurningarnar, sum vóru reistir. Meinar TÚ, at offringin av Signari var í lagi?

### Vandin at brúka javndømir

Guttormur hevur innlit og lívserfaring til at vita, hvat orðini týða og hvønn uppruna tey hava. Hann kennir sjálvandi týska orðið Schutsstaffel, og ikki sum ein annar lesarabrævsskrivari, ið fekk tað til Schutt-taffel (Schutt: grús ella burturkast. Taffel, ja kanska er tað Ålborgfabrikkin, sum spøkir), so hesin maður umsetir tað í sínum høvdi til: vánaligt brennivín. Ja mangt kann misskiljast.

Men Guttormur leggur nakað heilt annað í orðini, enn meint var. Nazistarnir hildu seg hava eitt problem við jødunum, og vildu loysa problemið við at útrudda teir. Í Føroyum eru hvørki jødar ella aðrir entiskir minnilutar, so tað er einki vandamál. Men í Føroyum eru nationalistar, sum vilja hava eina »endlösung« í loysingarmálinum, kosta hvat tað vil. Tí loyvdi eg mær at brúka hetta javndømi. Guttormur brúkar jú sjálvur týsk orð sum javndømir, Berufsverbot, sí seinni. Men eg sigi Guttormi takk fyri hansara orð uppá, at eg eisini í framtíðini trygt kann seta mínar føtur á klettarnar uttan at verða antastaður.

### Leiklutur miðlana

Eg gevi Guttormi rætt í, at miðlarnir eiga at vera ein “upplýsandi og stabiliserandi faktor mótvegis statsmaktini.” Onnur hava orða tað sum, at miðlarnir eiga at vera sum ein 4. statsmakt. Flestøll lond í vesturheiminum hava, sum Montesquieu skjeyt upp fyri meira enn 200 árum síðani, býtt valdið í samfelagnum í tríggjar partar, lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið, og gott er tað. Men hóast hetta trýbýti, kann systemið »skeiða út«. Tí er gott at hava eina kritiska 4. makt, sum skal halda eyguni eftir, um alt gongur rætt fyri seg.

Og eg havi virðing fyri miðlunum - um teir røkja hesa uppgávu. Har meini eg, at tað ikki altíð hevur verið so í føroyska miðlaheiminum, ella í hvussu so er ikki nóg gott. Tí er tað púra burturvið, at Guttormur sigur meg vilja hava Berufsverbot í Føroyum. Tvørtur í móti.

Guttormur sigur, at tá RG var stalinistur, tá hevði hann hugflog. Eg havi í mong ár hildi meg verið sosialist og okkurt slag av marxisti eisini. Og tað haldi eg meg framvegis vera. Soleiðis er tað. Men hvat eg havi skrivað - enntá við hugflogi - allarhelst í Framanum, sum eg veit at Guttormur las, ið fær hann at skýra meg stalinist, tað dugi eg ikki at síggja. Tað, sum eg fekst mest við har, var at skriva um føroyska vinnulívið, serliga partafeløgini, og hvør hevði búskapaligu maktina í samfelagnum. Hartil nakað um íbúgvafrøði (demografi), sum í grundini var rættiliga ópolitiskt.

Men, fylgja vit Guttormi, so heldur hann, at hugflog mítt var størri, tá eg var nakað, sum eg ongantíð havi verið. Hetta ger meg eitt sindur forvirraðan.

Nakað annað er so, at tann føroyski parturin av Føroyskum Sosialistum, sum skrædnaði frá og kallaðist Oyggjaframi, brúkti eitt búmerki, har bæði Stalin og Mao vóru við: Hatta hevði eg einki við at gera, men tú kundi jú kanna málið.

### Eri ikki limur í nøkrum flokki ella átaki.

Og nú meinar Guttormur, at eg havi fingið sálarligt mein, tí eg eri »undir skjúrtuvelinum á danska javnaðarflokkinum«. Enn einaferð er hann á skeivari leið. Eg eri hvørki limur í danska ella føroyska javnaðarflokkinum ella nøkrum øðrum politiskum flokki, tiltaki ella átaki. Men eg má so eisini krúpa til bekennilsi, at fyri nøkrum árum síðani var eg limur í Dansk Cyklistforbund. Havi onkuntíð havt tankan, sum kanska er eitt áskoðanarbrot, at kanska burdi eg melda meg inn aftur.

Men Guttormur hevur rætt at brúka øll tey invektiv (skemdarorð) honum lystir. Eg man sum persónur vera rættiliga óinteressantur. Ikki limur í nøkrum flokki, enn minni uppstillaður til nakað sum helst, havi sostatt ongar politiskar ambitiónir. So, kanska skuldi eg bara lagt av at skriva lesarabrøv, og sett meg at fylgja við í Horton-sagaen á TV-3 ella okkurt annað grípandi.

Men eg má viðganga, at politiskt svindil og humbukk kann gera meg so vreiðan, at skrivimaskinan má fram. So begangi eg tað deyðssynd - í eygum tjóðveldismanna - at eg seti eitt frímerki við Drotning Margretu á konvoluttin, koyri brævið í ein reyðan postkassa (sosialistiskt, tú veitst) og vóni so, at blaðstjórin á Sosialinum ella Dimmu eru mildir og taka tað upp. Teir hava so higartil vurdera, at mínar viðmerkingar vóru verdar at lesa. Eg sigi teimum takk, so mangar gangir.